

*Thomas Koba instruerar leikararnar í filminum, sum herfyri avdúkaði Ársins Virki*

**MYND:** ÁLVUR HARALDSEN

og eg dugdi heldur ikki at læra tað. At fortelja søgur við myndum segði mær onki. Eg var bara fasineraður av øllum teknikkinum. Tað var ikki fyrr enn eg byrjaði at arbeiða saman við Hans Petur Hansen, at nakað hendi. Tað var hann sum av álvara tendraði mín áhuga fyri at klippa myndir saman til filmar.

Síðani tá hava teir báðir arbeitt tætt saman bæði í Sjónvarpi Føroya og í Kovboyfilm, har Hans Petur Hansen stendur fyri filmsupptøkunum og ljósi. Triði maðurin í fyritøkuni er Michael Jensen, sum millum annað virkar sum marknaðarleiðari. Restina tekur Thomas Koba sær av, tað vil siga øllum frá at skriva handrit og instruera til at klippa og mastra.

Men sjálvt um hann dugir at síggja, at hann er vorðin dugnaligari og er heilt væl nøgdur við onkur av sínum avrikum, forðar tað ikki Thomasi Koba í at finna okkurt afturat at stúra fyri.

– Tað er altíð hasin óttin, tú veit, fyri at nú uppdagar onkur, at eg onki dugi allíkavæl og bara eri ein 'fake', sum hevur fuppað seg allan vegin fram.

> Tað er altíð hasin óttin, tú veit, fyri at *nú* uppdagar onkur, at eg onki dugi allíkavæl og bara eri ein »fake«, sum hevur fuppað seg allan vegin fram

### Í telt at fundast

Eitt, sum Thomas Koba kortini ikki stúrir fyri er, hvussu tað skal gangast lítlu filmsfyritøkuni Kovboyfilm. Tí nettup tað, at fyritøkan er so lítil ger, at skaðin er rættiliga avmarkaður, um uppgávurnar fækkast ella hvørva heilt.

– Tað ringasta, sum tá kann henda, er at Kovboyfilm gevst. Verri er tað ikki. Vit eru hvørki bundnir av stórum íløgum ella starvsfólkahópi, sum skal lønast. Tí eru vit heldur ikki noyddir at hópframleiða keðiligar faldarar og visitkort fyri at halda einum stórum maskinarii í gongd og kunnu siga nei til uppgávur, sum vit ikki tíma, sigur Thomas Koba.

At fyritøkan heldur ikki hevur egin høli, passar honum eisini fínt, tí hann orkar ikki tankan um eina fasta húsaleigu ella at skula fundast og fáa hugskot í somu skrivstovu hvørja ferð.

– Mín kreativi heili hevur eisini øgiliga nógv betri av at fara ein biltúr ella ein túr við telti, tá vit skulu stinga høvdini saman um eina nýggja uppgávu. Næsti fundur verður í Koltri, og tað vil eg nógv heldur enn inn í eitt fínt fundarhøli.

Heilt heimleys er fyritøkan tó ikki, tí í kjallaranum í húsunum í Syðrugøtu hevur Thomas Koba sína svørtu holu, har hann klippir filmarnar.

– Klippirúmið er fantastiskt, alt er málað svart og hvørki ljós ella ljóð sleppa inn. Har er næstan øll útgerð, sum eg havi brúk fyri, so har fái eg rættiliga nógva tíð at ganga.

### Tímir ikki at arbeiða

Spurdur, hvør hansara drívmegi sum filmsmaður er, ivast Thomas Koba eina løtu.

– Eg haldi, eg geri tað fyri at fáa viðurkenning. Tað hevur í øllum førum stóran týdning fyri meg, at onnur halda tað vera gott, sum eg geri.

Kenslan av at kunna skapa sín egna lítla veruleika í einum filmi er eisini ein týðandi kreativ drívmegi, og tí hevur tað eisini nógv at siga, at hann eigur hugskotini sjálvur.

– At brúka hugskotini hjá øðrum følist eitt sindur, sum tá man snýtir í Ludo. Tí kann eg faktisk eisini gott finna uppá at lata vera við at brúka eitt fínt hugskot, bara tí tað ikki er mítt egna, viðgongur Thomas Koba.

At ungi filmsmaðurin bara í ár hevur gjørt 40 føroyafilmar, onkrar lýsingar umframt filmin um Ársins Virki er í øllum førum ikki eitt úrslit av, at hann er eitt so øgiligt arbeiðsgrev, vissar hann um, tí hann arbeiðir sjáldan meir enn tveir, tríggjar dagar um vikuna.

– Í botn og grund tími eg ikki at arbeiða. Tað hevði passað mær fínt at gingið heima og onki gjørt. Eg havi ongantíð skilt fólk sum siga, at tey høvdu hildið á at arbeitt, sjálvt um tey vunnu 10 milliónir. Eg hevði givist í stundini

Hvat hann skuldi fingið tíðina at gingið við, veit hann ikki rættiliga, men tað hevði ikki verið nakar trupulleiki.

– Eg hevði nokk sitið í míni svørtu holu og nørdast á internetinum. Kanska gjørt ein stuttan spælifim – og stúrt fyri onkrum.

### Heimsins besta starv

Tá tað nú líkasum er reglan, at fólk flest eiga at arbeiða, er Thomas Koba sannførdur um, at hann hevur heimsins besta starv sum filmsmaður í Føroyum. At filmsframleiðsla er so nýggj enn her heima ger eisini, at tú lutfallsliga lætt verður tann einasti, sum fæst við eitt ávíst øki – sum til dømis verkætlanina við teimum 40 føroyafilmunum

– Reint praktiskt er tað besta við at gera filmar í Føroyum, at tú sleppur so lætt framat allastaðni og at fólk eru so hjálpsom. Eisini er tað óvanliga stutt upp til topparnar í føroyska samfelagnum – sum hinvegin heldur ikki eru serliga høgir.

Ein vansi við at arbeiða sum filmsfólk í Føroyum er kortini, at tú ongantíð verður ekspertur á tínum øki, tí øll eru noydd at duga eitt sindur av hvørjum og taka eina hond í allastaðni. Men eisini tað kann vera ein fyrimunur, heldur Thomas Koba.

– Tað ger í hvussu er, at tú kanst framleiða filmar rættiliga bíliga, tí tú ert ikki noyddur at seta eina rúgvu av ymsum fakfólkum á eina uppgávu. Tað kemur til dømis meir enn so fyri, at eg sjálvur hoppi inn sum statistur ella okkurt líknandi, sum ein útlendskur filmsprodusari heilt sikkurt hevði fatað sum eitt fornermilsi móti síni fakligheit.

### Leitar eftir føroyska filmsmátanum

Hóast hann onkuntíð kundi ynskt, at føroyska filmsumhvørvið var meir professionelt, gongur Thomas Koba ikki og droymir um at gera stórar filmsdreymar til veruleika í Føroyum. Ikki fyribils í øllum førum, tí tað er okkara filmsmentan ikki til klár til, heldur hann.

– Eg kenni ongan, sum megnar at skriva ein dialog á føroyskum, sum fungerar á filmi. Tá so onkur allíkavæl ger tað, virkar tað bara bygdasliga kiksað, tí vit hava onga tradition fyri einum føroyskum filmsmáli, sigur Thomas Koba og leggur afturat, at tað sama er galdandi fyri show-business sum heild.

– Show-bizz er snøgt sagt ikki til í føroyskari mentan, sum vit til dømis síggja tað í USA, har sjónvarpsvertir forføra hyggjarar, tí teir altíð eru eitt stig frammanfyri. Í Føroyum er tað øvut – her eru tað hyggjararnir, sum eru frammanfyri ella vita betri enn sjónvarpsvertirnir. Eftir mínum tykki er Jákup Veyhe tann einasti í Føroyum, sum kemur í nánd av einum forførandi verti og einum føroyskum filmsmáta at vera uppá, sigur Thomas Koba.

Hvat tað er fyri ein máti, veit hann ikki rættiliga, tí hann leitar framvegis eftir honum.

Fyribils savnar Thomas Koba seg tó um at gera teir seinastu 10 føroyafilmarnar klárar at fara út at ferðast.



## 40 FILMAR UM FØROYAR

**VERKÆTLANIN ››40 FILMAR›› HJÁ KOVBOYFILM UMFATAR HESAR STUTTFILMARNAR UM FØROYAR**

Ellisakfør
Sightseeing í Norðoyggjum
Norðurlandahúsið
Foto Safari
Føroyskar vinnur
Gjógv
Útróður í Vestmanna - havfiskarí
Norrøna - life on board
Over Ritter - »on the road«
Vestmannabjørgini
Mykines
Grøn orka
Mjørkadalur í útsýni
Drive in á Magn støð
Plantur í Føroyum
Reinur fiskur
Síging í Sandoy
Coastzone North Atlantic
Undirbeat
Folk Music Festival - Mykines
Mjørkadalur, Nato
Poetiskt innslag um Føroyar
Tari í Vestmanna
Seyður og Náttúra
Renning í Havn
Marglittu húsini í Havn
Smábátar
Koltur
Tónleikur
Norðlýsið
Tyrlutúrur í Føroyum
Flogtúrur við Atlantic Airways
SMS
Seyður/Ull & Móti
Festivalar í Føroyum
Sushi & Etika
Hvonn
Hotel Føroyar
Hotel Hafnia »in the heart of Tórshavn«
Tónleikari í Føroyum

*Føroyafilmarnir hjá Kovboyfilm síggjast á www.youtube.com/kovboyfilm*